## Missión

Vit virka fyri tryggum, góðum, matvørum, góðari djóraheilsu og ríkum, ódálkaðum umhvørvi

### Matvørur

- Virka fyri, at fólk ikki verða sjúk av at eta mat
- Sansabar góðska skal vera í lagi, og matvørur innihalda hvørki dálkandi evni ella heilivágsleivdir
- Brúkarin fær nøktandi og rættar upplýsingar

### Djóraheilsa

- Fyribyrgja og berja niður djórasjúkur og djórainfektiónir
- Fremja framleiðsluumstøður, sum tryggja djórum góða heilsu og vælferð

### Umhvørvi

- Minka um dálking, larm og burturkast
- Verja vistskipanir, náttúru og umhvørviseginleikar
- Menna samfelagið burðardygt

**Hornasteinurin undir hesari missión, er eftirlits-, kanningarstovu- og granskignarførleiki, sum munadygt lýsir og loysir allar viðkomandi trupulleikar innan matvørur, djórasjúkur og umhvørvi**

## Visión

Vit virka fyri tryggum, góðum, matvørum, góðari djóraheilsu og ríkum, ódálkaðum umhvørvi

- Altjóða viðurkendar kanningar í best møguligum kanningarstovum
- Eingi fólk gerast sjúk av mati
- Útlát hava ongan ampa
- Færri sjúk djór
- Virkin og framskygd tilbúgving
- Eitt attraktivt arbeiðspláss við fjøltáttaðum uppgávum og menningarmøguleikum
- Fremsta vitanarmiðstøð innan mat, djór og umhvørvi
- Týðandi íkast til almenna kjakið

## Virði

Fyri fakøkini matur, djór og umhvørvi arbeiðir Heilsufrøðiliga starvsstovan við hesum virðum

### Álit

- Dugnalig starvsfólk á einum stovni við sterkum trúvirði og óheftum fakligum arbeiði
- Eins viðgerð á einum fyrimyndarligum fyrisitingarligum støði
- Gjøgnumskygni og kunning eyðkennir samskiftið
- Okkara loysnir skapa meirvirði og álit
- Effektiv og opin fyrisiting
- Vit standa við okkara eftirlitsskyldur

### Trygd

- Tíðarhóskandi og góskutryggar skipanir í verki
- Greiðir karmar og greiðar eftirlits- og yvirvøkuskipanir
- Vandamál og fyirbyrging er kjarnin í arbeiðinum

### Vitan

- Fremjan av altjóða samstarvi og viðkomandi gransking
- Raðfesting av útbúgving og kunning er av størsta týdningi
- Framskygni og tilbúgving eyðkennir arbeiðið